# Marianna tikin upp við krana

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av landsynningi, um kvøldið veksur hann vindin til hvassan vind. Fyrrapartin turt, men seinnapartin regn ella vátakavi eitt skifti. Hitin millum frostmarkið og 3 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og suðri og regn. Seinnapartin støkkur hann vesturum og minkar vindin og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hann veksur vindin til hvassan vind av landsynningi og stundum regn. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Hvassur vindur av landsynningi, seinni hækkar hann upp í eystan. Stundum avfall og hitin millum 3 og 7 stig.

**Fyri ikki at órógva arbeiðið á sleipivongunum, var 45 tons tungi útróðrarbáturin av Strondum, Marianna, tikin upp á Tórshavnar Skipasmiðju við krana**

SKIPASMÍÐ
*Eirikur Lindenskov*

Seinnapartin mánadagin varð útróðrarbáturin, Marianna, av Strondum tikin upp á land í Havn. Marianna fórst illa í ódnarveðri á Strondum seinast í oktobermánaði í fjør, tá hon lá við bryggju á Heygsstøð á Strondum.

Báturin lá innan fyri brunnbátin, Víking, sum sleit og rak oman yvir Marionnu.

Báturin verður nú umvældur á Tórshavnar Skipasmiðju. Men hann varð ikki tikin upp við vanligu sleipivognunum í Sjarpholinum.

– Av tí at Venus og Báran stóðu uppi, valdu vit heldur at lyfta Marionnu upp við kranunum, sigur Kartin Lenvig, stálformaður.

– Báturin vigar 45 tons, og kranarnir lyfta ávikavist 55 og 60 tons. Av tí at útleggið var so langt, so máttu vit brúka báðar kranarnar, sigur Kartin Lenvig.

Báturin varð settur á ein vogn á bryggjuni í krókinum framman fyri Fiskasentralin og hálaður niðan til høllina hjá skipasmiðjuni við einum togara hjá Eimskip.

Kartin Lenvig sigur, at teir gjørdu á sama hátt, tá teir tóku Dragaberg upp at leingjast. Hetta sparir nógv arbeiði og órógvar ikki tað arbeiðið, ið fer fram á sleipivongunum annars.

Báturin er rættuliga illa farin, og skal tað mesta av báðum síðunum skiftast út. Motorur og gearkassi eru tikin úr og skulu eftirhyggjast.

Annars lata teir ikki alt ov væl at á Skipasmiðjuni, hvat arbeiði viðvíkur. Av tí at nógvar nýbyggingar fara fram eystanfyri, er meira soltið hjá skipasmiðjum á okkara leiðum – og allar skipasmiðjur eru svangar eftir nýbyggingum, sigur Kartin Lenvig.



*Marianna fór rættuliga illa í óndarveðri á Strondum í oktober í fjør. Nú verður báturin umvældur á Tórshavnar Skipasmiðju*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷16 |
| Nuuk | ÷10 |
| Qaqortoq | ÷8 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 3 |
| Tromsø | ÷1 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 3 |
| Helsinki | ÷4 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 3 |
| Warzawa | 4 |
| Kiev | 1 |
| Bukarest | 5 |
| Paris | 4 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 10 |
| Malorca | 12 |
| Athen | 16 |
| Malta | – |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 2 |
| New Dehli | 24 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | – |
| New York | 2 |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | 10 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | – |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 27 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1005 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikudagin.




Eitt lágtrýst, 974 hPa, við Hvarvið stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani kemur móti Føroyum og hevur nógvan vind við sær.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 29/01 kl. 06[00]–30/01 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 4,7°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

## AVFALL




Avfallið: 0,2 mm – mált frá 29/01 kl. 06[00]–30/01 kl. 06[00]
Avfallið higartil í januar: 107,7 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

24. jan.: Tendring/Mánin longst frá jørðini
1. febr.: Fyrra kvarter
7. febr.: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 31. jan | 11:18 | 23:57 | 10:18 | 22:57 | 10:33 | 23:12 | 00:58 | 13:18 | 01:58 | 14:18 | 09:33 | 22:12 |
| 1. feb. | — | 12:12 | 11:12 | 23:48 | 11:27 | — | 01:57 | 14:12 | 02:57 | 15:12 | 10:27 | 23:03 |
| 2. feb. | 00:48 | 13:24 | — | 12:24 | 00:03 | 12:39 | 02:48 | 15:24 | 03:48 | 16:24 | 11:39 | — |
| 3. feb. | 02:00 | 14:24 | 01:00 | 13:24 | 01:15 | 13:39 | 04:00 | 16:24 | 05:00 | 17:24 | 00:15 | 12:39 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 31. jan | 08:33 | 21:12 | 11:33 | – | 00:13 | 12:33 | 11:03 | 23:42 | – | 12:18 |
| 1. feb. | 09:27 | 22:03 | 00:12 | 12:27 | 01:12 | 13:27 | 11:57 | — | 00:57 | 13:12 |
| 2. feb. | 10:39 | 23:15 | 01:03 | 13:39 | 02:03 | 14:39 | 00:33 | 13:09 | 01:48 | 14:24 |
| 3. feb. | 11:39 | — | 02:15 | 14:39 | 03:15 | 15:39 | 01:45 | 14:09 | 03:00 | 15:24 |


TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG



12. MAÐUR
http://soccer.at/faroes